## Kursirnir óálítandi

- Kursirnir avspegla ikki úrslitini hjá bankunum. Tað kennist sjálvandi ikki so gott at standa framman fyri stórum íleggjarum, tá paartabrøvini hava so nógv minni virði, men eg haldi ikki, at hetta er ein gongd, sum ávirkar nevndina. Og fyri at rætta upp á hetta krevst, at altjóða fíggjarstøðan gerst betri. Gerst hon ikki tað, so ávirkar hetta ikki bara Føroya Banka. So í løtuni liggur støðan hesum viðvíkjandi ikki í hondunum á Føroya Banka, sigur Jóhan Páll Joensen.



## Bíða við at selja

Jóhan Páll Joensen heitir á Fíggingargrunnin frá 1992 um at bíða við at selja seinasta triðingin av partabrøvunum í Føroya Banka. – Vit eiga at steðga við at privatisera seinasta triðingin av bankanum so leingi, sum altjóða fíggjarmarknaðirnir eru, sum teir eru, sigur Jóhan Páll Joensen. Alla staðni frá ljóða ávaringar um fíggjarkreppuna, og Jóhan Páll Joednsen heldur, at kursurin má koma í minsta lagi upp aftur á 189, sum hann var við fyrstu søluna, áðrenn seinastu partabrøvini verða seld.

# Far tá tú einki kann geva meir

**Eftir fimtan árum í nevndini hjá Føroya Banka valdi Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður, at leggja frá sær á aðalfundinum fríggjadagin**

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður í Føroya Banka, hevur nú lagt frá sær eftir fimtan ár.*

- Tú skal verða so leingi í einari nevnd, sum tú merkir tú kanst geva eitt íkast. Tá tú ikki kennir tað meiri, er tíð at fara burturúr.

Tað sigur Jóhan Páll Joensen, nú fyrrverandi nevndarformaður í Føroya Banka.

Hann kennir, at hann nú hevur givið bankanum tað, hann kann, og tí hevur hann valt at leggja frá sær.

- Men hetta er ikki nakað nýtt. Eg havi hugsað um at lagt frá mær seinastu fimm árini, men tað hevur altíð verið onkur annar í nevndini, sum er givin. Í fjør var støðan so, at privatiseringin stóð fyri durum, og tá næstformaðurin valdi at leggja frá sær metti eg, at tað fór at ávirka tilgongdina ov nógv, um eg eisini segði meg frá, sigur Jóhan Páll Joensen.

Hesi fimtan árini hevur Jóhan Páll Joensen upplivað bæði aldudalar og –toppar.

- Tað truplasta var fyrsta tíðin. Serliga trupult var at siga fólki úr starvi. Hinvegin má sigast, at vit nú í dag kunnu lata ein banka frá okkum, sum er í góðum standi, og tað eri eg ógvuliga fegin um, sigur Jóhan Páll Joensen.

Hann vísir á, at bankin hevur gott gjaldføri og góðan solvens, og er annars væl brynjaður til tær avbjóðingar, sum liggja fyri framman.

- Eg eri væl nøgdur við gongdina, sum hevur verið hesi fimtan árini. Nú er tað altjóðagerðin, sum stendur fyri framman, og bankin er mitt í hesi tilgongdini. Tað kundi sjálvandi verið spennandi at verið við til hetta eisini, men eftir fimtan árum er tíðin komin at lata onkran annan sleppa framat, sigur Jóhan Páll Joensen við Rás2.

# Spennandi avbjóðing

**Tað heldur Claus Rasmussen, sum av aðalfundinum varð valdur í nevndina hjá Føroya Banka, sum síðani valdi hann til formann**

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Claus Rasmussen er nýggjur nevndarformaður fyri Føroya Banka*

Tað gjørdist Claus Rasmussen, grannskoðari, ið tók við starvinum sum nevndarformaður í Føroya Banka eftir Jóhan Páll Joensen.

- Hetta er ein stórur og spennandi avbjóðing. Nú komi eg at sita hinumegin borðið, kann man siga. Tað eru nakrir partabrævaeigarar, sum hava álit á, at eg kann tilføra bankanum nakað, og so mugu vit bara síggja, hvussu tað gongur, sigur Claus Rasmussen.

Í fjør gjørdi Claus Rasmussen av at gevast sum stjóri og grannskoðari í felagnum Rasmussen og Weihe, og flyta til Danmarkar at búgva. Men tað heldur hann ikki verða nakra forðan fyri starvinum sum nevndarformaður í Føroya Banka.

- Nei, tað er eingin trupulleiki at búgva í Danmark. Tað er jú so skjótt at sleppa aftur og fram, og burtursæð frá nevndarformanspostinum í Føroya Banka, havi eg bert nakrar aðrar nevndarsessir, so eg havi góða tíð, sigur Claus Rasmussen.

Sum grannskoðari hevur hann gott innlit í føroyskt vinnulív og eisini føroysku bankaverðina, so hvørjar broytingar ætlar hann sum nevndarformaður at fremja?

- Nei, nú fari eg fyrst at síggja tíðina ann, áðrenn eg úttali meg meiri ítøkiligt um tað, sigur nýggi nevndarformaðurin.

Hann hevur nú í eina tíð havt møguleikar at eygleiða gongdina av síðulinjuni.

- Bankin er privatiseraður nú, so tað er ein spennandi tíð vit ganga ímóti, sigur Claus Rasmussen við Rás2.



# Føroya Banki nýggja nevnd

**Á ársaðalfundinum hjá Føroya Banka fríggjadagin vórðu tríggir nýggir limir valdir í nevndina. Teir eru Wilhelm Petersen, Kjeld Søndergaard Holm, og Klaus Rasmussen, sum er nýggjur nevndarformaður**

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum kunngjørdi nevndarformaðurin seinastu 15 árini, Jóhan Páll Joensen, at hann tók ikki við afturvali. Samstundis boðaði hann frá, at Graham Stewart og Eyðhild Skaalum heldur ikki tóku við afturvali. Haraftúrmóti tók Jens Erik Christensen við afturvali.

Starvsfólkavaldu nevndarlimirnir, Olav Enomoto og Sigmar Jacobsen, stóðu ikki fyri vali.

Sp/f Skrínið, p/f Lago Føroyar og p/f 14 skutu upp at velja Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, Kjeld Søndergaard Holm stjóri í Adversti og nevndarlimur í Nykredit og Danske Bank Private Equity, og Klaus Rasmussen, grannskoðari og sjálvstøðugt vinnurekandi, í nevndina. Hetta samtykti aðalfundurin einmælt.

Aðalfundurin samtykti einmælt at taka til eftirtektar ársfrágreiðingina hjá nevndini. Eisini varð samtykt at rinda partaeigararunum 45 mió. kr. í vinningsbýti.

Nevndin í Føroya Banka hevur eftiraðalfundin skipað seg við Klaus Rasmussen sum formanni og Jens Erik Christensen sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir eru nú Wilhelm Petersen, Kjeld Søndergaard Holm, Olav Enomoto og Sigmar Jacobsen.

Aðalfundurin hevði onga viðmerking um samsýningarpolitikk bankans.